Meginfelag teirra brekaðu

Sjey feløg — 2200 limir



Í starvsnevndini fyri MBF sita Karin M. Joensen-Næs, skrivari, Trygvi Jacobsen, formaður og Margreta Næss, kassameistari

Tá ST lýsti 1981 at verða ár teirra brekaðu, fóru ymsu áhugafeløgini í Føroyum til verka, og gjørdi rúgvusmikið arbeiði.

Eitt úrslit av hesum varð, at MBF (Meginfelag teirra brekaðu) varð stovnað í 1982.

Í MBF eru nú sjey feløg. Hesi eru: Javni, Bjørg, Føroya Blindafelag, Deyvafelag Føroya, ÍSB ítróttarfelag, Sclerosufelagið og Sinnisbati. Á tíðindafundi í farnu viku, greiddi starvsnevndin í MBF frá arbeiðnum. Í starvsnevndini sita Trúgvi Jacobsen, formaður, Margreta Næss, kassameistari og Karin M. Joensen-Næs, skrivari.

Umframt starvsnevndin, so er felagsnevnd, har formenninir í teim sjey feløgunum, hava hvør sín lim.

Endamálið við MBF er at virka fyri áhugamál teirra brekaðu, og hevur MBF her rættiliga gjørt vart við seg.

Eitt limablað kemur nú út fýra ferðir árliga, har øll sjey áhugafeløgini fáa hvør sína síðu, at lýsa støðuna, hvør sær. Umframt hetta, so hevur MBF givið út bókling, sum í innihaldi upplýsir um almannaskipanina, og hvar ein skal venda sær, fyri at fáa hjálp.

Annað úrslit av »ár teirra brekaðu« var arbeiðið sum feløgini gjørdu í hesum tíðarbili. Umleið 30 smábólkar gjørdu ymiskt arbeiði, og fekk ein bólkur til uppgávu at fáa til vega tilfar, undir heitinum: »Tilboð til heim við brekaðum børnum«. Hesin bóklingur er nú prentaður og kemur í bókabúðirnar í vikuni.

Bussleiðin

Annað tiltak, sum MBF hevur avrikað er at stovna bussleið fyri brekað. Bussurin hevur til húsa á Brandstøðini í Havn, har brekað kunnu venda sær, sum hava brúk fyri koyring. Brandmenninir virka sum bilførarar, og er bussurin at sammeta við ein taxabil. Tú ringir eftir honum, og verður koyrd frá heiminum til dyrnar, har tú skalt fara. Tann ið leigar bussin, rindar somu upphædd sum tann, ið koyrir við vanligu bussleiðini. Bert ein váttan frá kommunulæknanum er neyðug, fyri at fáa loyvi at nýta bussin hjá MBF.

Framtíðar virksemi í MBF til tess at skapa betri kor fyri brekað er m.a. at útvega limunum lán úr Húsalánsgrunninum. Eftir lógini fæst bert hægsta lán, um tú byggir hægst 120m². Av tí at heim við brekaðum hevur tørv fyri meira plássi enn vanligt, er tað umráðanid, at markið verður hækkað. MBF hevur fingið áheitan frá foreldrum at rørslubrekaðum barni, sum hevur tørv á størri rúmd, — eitt nú til koyristól o.a., sum er neyðugt fyri tann brekaða í gerandisdegnum.

— Vit halda, at tað er eitt órímiligt mark, sigur starvsnevndin. Tí settu vit okkum í samband við Húsalánsgrunnin, men har fingu vit boð um, at lógin fyri Húsalánsgrunnin skuldi broytast, um størri lán skuldi veitast. Í Landsstýrinum fingu vit boð um, at tað ikki var neyðugt við lógarbroyting, fyri at ganga hesum foreldrum á møti.

Hetta er bert eitt av dømunum um, hvat MBF fæst við, sigur starvsnevndin.

MBF-grunnurin

Annað tiltak er, at felagið hevur sett á stovn MBF grunnin, har stovnsfæið 100.000 krónur eru settar á bundna konto. Grunnurin hevur nú 200.000 krónur. Peningurin stavar frá gávum, sum felagið hevur fingið.

Á fundi 23. februar 1984 vóru viðtøkur fyri grunnin góðkendar av nevndini. Ein nevnd varð vald at umsita grunnin og eru hesi: Carl Weihe, Norðagøtu, Ása í Dimum Højgaard, Tórshavn og Jan Zachariassen, Norðagøtu.

Endamálsgreinin fyri grunnin er at veita hjálp til brekað, sum til fánýtis hava sókt Færøernes Ulykkesforsikring um hjálp. At veita stuðul til skeiðvirksemi fyri brekað í Føroyum og uttanlands, — tó treytað av, at umsøkjarin er limur í einum limafelag innan MBF, og at veita stuðul til ferðir fyri brekað innan- og uttanlands.

Framhald á síðu 17

Eitt kongaríki í samfelagnum

Um SEV-viljan til at brúka varandi orkuna — vindin

Nú eru liðin meiri enn seks ár síðani Birgir Enni og Riisager bygdu vindmyllurna á Tvøroyri.

Síðani tá er nógv hent á vindmylluøkinum í Føroyum. Og í dag hava vit vindmylluútflutning, takkað veri Riisager, Birgir Enni og altíð framskygdu Miðvágssmiðjuni.

Sosialurin viðgjørdi hesa nýggju vinnu hegnisliga í oddagrein hósdagin. Hendan oddagrein saman við at SEV nú er farið undir lýsingarøð í bløðunum, og at SEV-leggingin av Eiðisvatni er farin igongd, eru orsakirnar til hesa grein.

Fyri góðum fýra árum síðani vóru vit nøkur húski, ið hugsaðu um at keypa og reka eina føroyska vindmyllu, soleiðis at vit beinleðis kundu vera við til at nøkta el-tørvin, og kanska eftir áramáli fingið bíligari streym afturfyri. Væl hóskandi vindlendi er á staðnum.

Soljóðandi skriv varð sent lutafelagnum SEV:

S.E.V.
3815 Vestmanna

Av tí, at tað nú sær út til at vera tekniskt møguligt at fáa sær haldgóðar vindmyllur, og tí tað her á plássinum eru góðar umstøður til vindmyllu, hava vit áhuga til at fara undir eitt vindorkuprojekt. Men av tí at hetta er kostnaðarmikið, og vit ikki røkka tað einsamøll, er ætlanin at umleið so nógv húski sum vindmyllan klárar at føða við el-megi vera uppií.

Áðrenn farið verður víðari við málinum vilja vit tí spyrja tykkum um hendan myllan kundi verið knýtt í el-net tykkara, soleiðis at tit líkasum flyta streymin frá mylluni, og til tann einstaka eigaran, móti ávísum flutningsgaldi pr. kWt.

Herafturat vilja vit spyrja, um tit kundu keypt eina møguliga meirframleiðslu, tí so kundu vit roynt at framt hetta á tann hátt, at meirframleiðslan dekkaði flutningsgjaldið, so at hvør einstakur eigari eftir ta fyrstu stóru íløguna fær streym til viðlíkahaldskostnaðin av mylluni.

Við heilsan
Hanus Vang
Á Vatnskørðum



Spennandi var at bíða eftir svari frá SEV. Og vit bíðaðu og bíðaðu. Men onki svar kom. Tá rykt varð munnliga eftir svari, fekst bara at vita, at SEV ikki metti vindorkuna áhugaverda. Men veruligt svar fekst ongantíð. Sum sagt so eru nú fýra ár og hálvur annar mánaði liðin síðani brævið varð sent, so nú man neyvan nakað svar koma.

Í hesum døgum hevur SEV áhugavert og snøgt upplýsingartilfar í bløðunum, tað einast ið manglaði í, var sáttmálin við danska »jørðbissufelagið« Højgaard & Schultz.

Í hesi reklamu stendur okkurt um, at við vindorku kann SEV ikki veita trygd fyri døgurðastreyminum.

Men vindorka saman við olju, koli og vatni kundi saktans klárað tørvin. Er vindur, so spara vit olju og dálka ikki luftina. Er stilli, so brúka vit fyrst og fremst vatn og seinast motorarnar.

Eisini kundu vindmyllur pumpað vatn uppi vatngoymslur.

Varð farið í gongd fyri fýra árum síðani at byggja vindmyllur í stórum, hevði Eiðisvatn fingið frið, samstundis sum vit dagliga spardu hópin av olju.

Vatnorka er varandi og rein orka, men rúka vøtn og firðir av skilaleysari útbygging, er prísurin alt alt ov stórur.

Í Danmark og USA, sum sýnast at vera teylond føroyingar »læra mest av« er ógvuliga vanligt, at fólk í felagsskapi keypa og byggja vindmyllur, og hvørja ferð flytir el-felagið streymin til einstaka eigaran, og hvørja ferð keypir el-felagið meirframleiðsluna. Í flestu førum eru hesi el-feløg enntá privat.

Men her hjá okkum eiga vit øll, um kommununa, lutafelagið SEV. Og av tí at vit øll eiga og brúka felagið, hevur tað fingið eitt slag av einkarrætti, men tað í sær sjálvum átti ikki at spilt spælið.

Tað ið galið er, er at ov langt er ímillum »høvding og indianara«. Frá tær til eitt býr- ella bygdarráð, sum so aftur velur onkran, viðhvørt tilvildarligan persón í umboðsráðið. Umboðsráðið velur so eitt stýri. Hetta stýri er at enda millumlið frá stjóra/-felag til einstaka brúkaran.

Henda skipan má nú kunna sigast at vera óheppin, tá hugsað verður um kluftina ímillum partarnar, serliga við at treiskast við at oyðileggja vøtn.

Við ikki at svara fyrispurningum frá vælmeinandi lutaeigarum hevur el-felagsleiðslan sett seg ov fast á trúnuna, — frá tænara til harra. Við einoygdu og bondsku framferðini í vatnútbyggingini hevur felagið enn meiri víst tenn.

Við sovorðnari framferð verður skinndemokratiið í felagnum undirminerað. Og frástøðan ímillum brúkaran og dagligu leiðsluna verður eins stór sum úr Hoyvík til hvítusunnu. Og tað var væl ikki ætlanin?

Hanus Vang,
verkfrøðingur

BOSAL
bosal
ÚTSTOYT
Esmar Simonsen
3813 Fuglafjørður